

Vársetan ‘27
frá 6. til 18. mai
sólorka
Country- og dansibandstema
Ársins grillveitsla



# Eitt eldorado av hugna og upplivingum

Várveitslan er ein av klassisku setum okkara við hópin av upplivingum í tí góða veðurlagnum.

Umframt at sóla tykkum og annars taka tykkum av løttum, ber um dagin til at gera fimleik, at ganga vakrar túrar og at koma við á eina ella fleiri av vøkru og áhugaverdu útferðum okkara.

Klokkan 18 hittast vit øll at lurta eftir framløgum, samrøðum, undirhaldi og livandi tónleiki og at syngja saman afturvið onkrum góðum úr ókeypis kafé okkara.

Hvørt kvøld ber til at dansa í Sólorkuklubbanum undir stjørnuklára himmalinum afturvið fyrstafloks livandi tónleiki. Hesaferð er enntá ætlanin at hava bæði dansibandstónleik og country (herundir linedans) sum tema.

Og so er tað Várveitslan, ársins grillparty..















# Várveitslan verður aftur ársins grillparty













Festlig tema á Vaglinum og í Klubbanum



# Dansibandstónleikur + Country við linedansi

Flestu av gestum okkara elska at dansa, og summi kunnu næstan ikki fáa ovmikið av tí. Tað halda vit vera sera festligt. Vit hava tí gjørt av, at næsta vártema okkara skal snúgva seg um dans.

Burtur úr rúgvuni av tónleiki og dansi hava vit valt tvær sjangrur, sum nógvum føroyingar dámar avbera væl – dansibandstónleik og country & western. Hetta seinna fara vit at kombinera við skeið í linedansi.

Vit hava mangan nógv ung fólk á vitjan, og eisini teimum dámar væl linedans. Okkurt kvøldið fara vit til stuttleika at læra okkum teirra dansir í felag.





# Albir Garden Resort

Mitt í lítla hugnaliga býnum Albir hava vit 60.000 fermetrar av føroyskum grannalagi. Her kanst tú gista í nýumvældum kømrum ella góðum íbúðum. Umframt svimjihyljarnar (innandurahylurin er hitaður) hava vit okkara egna vatnland, og tú kanst sjálvandi brúka bæði venjingarrúmið og hitarúmið.

Tað er eisini her í tí stóra urtagarðinum, at tú kanst njóta allar løturnar á Vaglinum og í Klubbanum umframt at gera fimleik og aðrar rørslur á Vøllinum

Hiðani tekur tað bert einar 15 minuttir at spáka oman á strondina gjøgnum miðbýin fram við nógvum matstovum, kaféum og krambúðum.







**www.albirgardenresort.com**



**Vegleiðandi prísur: kr. 16.800 *)**
**fyri hvønn, um tvey gista saman**
**(Eyka fyri einakamar: kr. 1.800,-)**

***) Endaligur prísur kemur í næstum**

**PRÍSURIN FEVNIR UM**

- **Beinleiðis flúgving (við mati umborð) og busskoyring t/r**
- **Gisting í 12 nætur**
- **Morgundrekka, miðmála og døgurða v/drykkjuvørum**
- **Føroyskar vertir, hjálparfólk og lækna allan sólarringin**
- **Fimleik, dans og aðra rørslu**
- **Hugnaløtu á Vaglinum við ókeypis kafé og spennandi skrá hvønn dag klokkan 18**
- **Kvøldarhugna og dans við livandi tónleiki**
- **Høvi at tekna teg til nógvar áhugaverdar útferðir fyri lagalig eykagjøld.**

**solorka@solorka.com • tlf. 221090**